LM-086/2020

Fylgiskjal 5

**UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ**

Dagf.: 26. januar 2021
Málsnr.: 20/02422
Viðgj.: SPS

## Hoyringarnotat

**Uppskot til løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarafyritøkum**

Uppskotið varð sent til hoyringar 22. september 2020 hjá: SEV, Føroya Handverksmeistarafelag, Vinnuháskúlanum, Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, Maskinmeistarafelagnum, Vinnuhúsinum, Áhugafelagnum hjá elinnleggjarum og Mentamálaráðnum.

Freistin at svara varð ásett til 6. oktober 2020.

Tað eru innkomin hoyringarsvar frá: SEV, Føroya Handverksmeistarafelag, Niels Johannessen, maskinmeistaralærari á Vinnuháskúlanum og Arbeiðs- og brunaeftirlitinum.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið tekur undir við uppskotinum, og hevði annars ikki viðmerkingar til uppskotið.

Við støði í innkomnu ummælunum viðgjørdi Elnevndin uppskotið aftur.

Ein meiriluti í nevndini tók undir við uppskotinum, og metti ikki, at innkomnu ummælini hava við sær, at broytingar eiga at verða gjørdar í uppskotinum.

Ein minniluti í Elnevndini mælti til, at hjávinnuløggildingarnar verða strikaðar.

Niðanfyri er ein samandráttur av ummælunum frá SEV, Føroya Handverksmeistarafelag, Niels Johannessen, maskinmeistaralærari á Vinnuháskúlanum og viðmerkingar til innnkomnu ummælini.

*SEV*
Hevði generellar viðmerkingar um, at uppskot til kunngerðir mangla, at SEV skal gjalda men ikki valda, at SEV skal takast við, tá kunngerðirnar verða gjørdar.

Tá uppskotið var til hoyringar fyrru ferð í vár, mælti SEV til at strika frítíðarløggildingarnar.

SEV verður við í arbeiðinum at orða kunngerðirnar.

**Hjávinnuløggildingar**

*Føroya Handverksmeistarafelag*

## UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tekur ikki undir við hjávinnuløggildingunum, men mælir til at strika verandi frítíðarløggildingar. Tað er framvegis ikki nóg trygt, at tann sum ger el-installatiónir, ikki er vanur við hetta arbeiðið. Hjávinnuløggildingar máa støðið undan vinnuligum el-innleggjaravirksemi. Tað er av alstórum týdningi fyri búskapin og kappingarførið í landinum, at el-fyritøkurnar framhaldandi mennast í hesum tíðum, tí tøkniliga menningin er stór. Hetta kann bert gerast við at hava el-virkir, sum aktivt kappast á jøvnum føti. Ein treyt fyri hesum er, at lægsti felagsnevnari er á hægri støði, enn lógaruppskotið leggur upp til.

*Niels Johannessen, maskinmeistaralærari á Vinnuháskúlanum*
Tekur ikki undir við, at hjávinnuløggildingarnar verða tíðaravmarkaðar til 5 ár og heldur ikki við treytunum um, at góðkendi fakligi ábyrgdarin skal halda førleikan við líka og treytini um, og at fyritøkan skal hava eina góðskuleiðskuskipan. Tað er ikki víst á, at skaðatilburðir ella líknandi kunnu rættvísgera avmarkingina og viðlíkahald av góðskuleiðsluskipan verður ov tung fíggjarliga og umstingarliga fyri smærru fyritøkurnar.

**Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins**
Í dag er møguligt at fáa eina sonevnda frítíðarløggilding, har vikið verður frá kravinum. Treytin fyri at fáa eina slíka løggilding er, at tað løggildingarkravda arbeiðið verður gjørt av løggilda persónliga og ikki av starvssettum.

Eftir uppskotinum til nýggja løggildingarlóg, sum varð sent til ummælis seinasta vár, var ætlanin at útfasa frítíðarløggildingarnar soleiðis, at tað ikki skuldu verða givnar nýggjar frítíðarløggildingar, men at verandi frítíðarløggildingar kunnu halda fram, men sum ein frítíðarløggilding, har eigarin fekk góðkenning sum fakligur ábyrgdari, og við kravi um eina góðskuleiðsluskipan.

Orsøkin til at skotið varð upp at útfasa fríðtíðarløggildingarnar var m.a., at eftir uppskotinum verða sett nýggj krøv til fyritøkurnar um eina góðkuleiðsluskipan, og tað kann skapa iva um, hvørt fyritøkur við frítíðarløggilding kunnu liva upp til krøvini um góðskuleiðsluskipan. Eisini kann vera ivi um krøv um viðlíkahald av fakligu førleikunum.

Í ummælunum, sum komu inn frá feløgum og stovnum, vóru ymiskar áskoðanir um, hvørt frítíðarløggildingarnar eiga at verða útfasaðar, ella eiga at kunna halda fram. Víst varð m.a. á, at eitt ófrávíkiligt krav um 30 tímar arbeiðsviku kann gera tað trupult hjá nýggjum veitarum at fáa løggilding, tí tað tekur tíð at byggja ein kundaskara upp, og at tað, um tíðirnar broytast og arbeiðini fækkast, kann fara at verða trupult hjá smáum veitarum at varðveita løggildingina.

Hinvegin varð eisini víst á, at ivi kann verða um fakligu førleikarnar og harvið við trygdina, um løggildingarkravt arbeiði bert verður gjørt sum hjávinnuvirksemi. Eisini varð víst á, at tað er avgerandi fyri trygdina og fyri at skipanin ikki skal virka kappingaravlagandi, at tað verða sett somu krøv um góðskuleiðsluskipan til frítíðarløggildingar, sum sett verða hinum løggildingunum.

**UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ**

Við støði í innkomnu ummælunum hevur Elnevndin tikið spurningin uppaftur. Mett er um, undir hvørjum treytum tað er ráðiligt at víkja frá kravinum um, at starvið sum tekniskur ábyrgdari í fyritøkuni skal vera eitt fulltíðarstarv við atliti at eltrygd øðrumegin og atliti at m.a. møguleikunum hjá nýggjum veitararum at fáa løggilding hinumegin.

Mett verður, at hetta er ráðiligt, um tað verða settar samsvarandi treytir, sum í dag verða settar frítíðarløggildingum, men tillagaðar og latnar fyritøkuni sum ein hjávinnuløggilding, og at fyritøkan annars skal lúka somu krøv, sum aðrar løggildar fyritøkur, undir hesum krav um góðskuleiðsluskipan.

Skotið verður upp, at tað frameftir eisini skal bera til at fáa eina løggilding líknandi sonevndu frítíðarløggildingini, men tillagaða og latna fyritøkuni sum ein hjávinnuløggilding. Treytin er, at eigarin av fyritøkuni samstundis verður góðkendur sum fakligur áybyrgdari, og at tað er fakligi ábyrgdarin, sum persónliga skal gera løggildingarkravda arbeiðið, og at talan ikki er um størri og fakliga meira krevjandi uppgávur.

Fyritøkan við hjávinnuløggilding skal lúka somu krøv um góðskuleiðsluskipan, sum aðrar løggildar fyritøkur.

Eftir uppskotinum verður sett krav um, at fakliga góðkendi heldur yrkisliga og fakliga førleikan við líka. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um hetta, undir hesum kann verða ásett krøv um skeiðsluttøku.

Fyri at styrkja møguleikarnar at hava eftirlit og at eftirmeta hesar løggildingar, verður skotið upp, at hjávinnuløggildingarnar eru tíðaravmarkaðar til 5 ár, men við møguleika at leingja, um treytirnar eru hildnar, og eigarin samstundis fær longt sína góðkenning sum fakliga ábyrgdur í fyritøkuni.

Góðskuleiðsluskipanin er ein hornasteinur í lógaruppskotinum við atliti at eltrygd.
Ein slík skipan er ikki líka umsitingarliga og fíggjarliga tung fyri eina lítla, sum fyri eina stóra fyritøku.

**Møguleikin hjá útlendskum fyritøkum og persónum at gera elinnleggjaraarbeiði í Føroyum**

*Føroya Handverksmeistarafelag*
Tá ein el-innstallatión verður gjørd, er tað alneyðugt, at el-innstallatørurin er til at fáa fatur á og tøkur skjótt at koma á eitt byggipláss ella bygning, eisini tá arbeiðini eru liðug. At tað í lóggávu verður gjørt møguligt at innflyta el-innstallatørar at gera arbeiði, og har hesir so fara av landinum aftur, er burturvið. Hesin arbeiðsháttur er ótryggur, og tað er ikki til at skilja, at landsins myndugleikar skuldu ynskt hetta. Somuleiðis vil hetta merkja, at serliga størri el-arbeiðir verða útveitt til útlendskar fyritøkur, við tí úrsliti, at føroyskar fyritøkur sita við viðlíkahaldinum.

## UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Føroya Handverksmeistarafelag vísti á í januar, tá hetta lógaruppskotið eisini var til hoyringar, at tað er løgið, at landsstýrið við vilja lækkar gáttina fyri útlendingum, tá tað er sera trupult hjá føroyskum el-innstallatørum at fáa løggilding í nøkrum øðrum landi.

Neyðugt er hjá el-innleggjaranum at hava fastan bústað í Føroyum.

**Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins**
Av § 1, stk. 1, nr. 2 í galdandi løggildingarlóg gongur fram, at tað er ein treyt fyri at fáa løggilding, at umsøkjarin skal hava fastan vinnustað við telefon her í landinum.

Skotið verður upp, at hendan treytin verður broytt til eitt krav um adressu í Føroyum ella í einum landi, sum Føroyar hava gjørt avtalu við um útinnan av lógarreguleraðari vinnu. Tað merkir, at tað er ein adressa, sum fyritøkan í royndum nýtir.

Endamálið við hesi treyt er, at Elnevndin sum myndugleiki og eftiransingarstovnar sambært § 13 í uppskotinum í royndum hava eitt stað, har tað kann verða útint eftirlit við fyritøkuni, sum treytar, at fyritøkan í royndum er til staðar á adressuni. Tað er tí ikki nóg mikið við eini proforma skipan, t.d. ein teldupostadressa ella ein t-postkassi.

Um fyritøkan skal arbeiða í Føroyum eitt styttri tíðarskeið viðvíkjandi eini ávísari uppgávu, kann hon søkja um fyribils løggilding, sum er galdandi í eitt ár.

Um fyritøkan varandi skal gera løggildingarkravt arbeiði í Føroyum, skal fyritøkan hava fastan vinnustað her.

Krav verður sett um, at fyritøkan hevur góðskuleiðsluskipan, sum er javngóð við ta, sum er ásett í § 13 í lógaruppskotinum.

Í kunngerð verða ásettar reglur um útinning av vinnu sum fakligur ábyrgdari við støði í útlendskum vinnuførleikum, m.a. um forboð fyri fyribils ella tilfallandi útinning av vinnu sum fakligur ábyrgdari, fyri persónar, sum ikki lúka førkeikakrøvini.

Henda skipanin tryggjar neyðug atlit til eltrygd, tá útlendskar fyritøkur og persónar við førleikum frá útlandinum gera løggildingarkravd arbeiði í Føroyum.

**Útbúgvingarkrøv**

***Føroya Handverksmeistarafelag***
"Eisini tykist tað undarligt, at ein maskinmeistari, sum ikki hevur verið í læru sum elektrikari, kann gerast el-innleggjari. Er handverksútbúgvingin sett til síðis? Føroya Handverksmeistarafelag hevði roknað við, at mann ruddaði út í hesum óskili. Føroya Handverksmeistarafelag stúrir fyri, at elektrikara útbúgvingin verður undirgrivin, um lógin verður samtykt, soleiðis sum hon er orðað. Neyðugt er við áseting í lógini um, at el-innleggjari frammanundan er elektrikara lærdur."

**Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálarásins**
Nærri nærreglur um, hvørjar útbúgvingar og royndir geva atgongd til góðkenning sum fakligur ábyrgdari verða ásettar í kunngerð sambært løggilgingarlógini. Innihald í útbúgvingini sum maskinmeistari og krøv til upptøku til útbúgvingina verða ikki ásett við heimild í løggingingarlógini, men við heimild í løgtingslóg um útbúgving av manning á skipum o. ø. Í hesum reglum er í dag einki krav um, at maskinmeistari skal hava verið í læru sum elektrikari.